## DAGSINS MEINING

# Tíðartekin ella tilvild

Fundur á Vaglinum leygardagin var áhugaverdur á mangan hátt. Eitt er at fólk hava tikið seg saman at mótmæla kríggsørskapinum. Hetta er í sær sjálvum gott og rætt. Annað er so hetta, at fyrireikararnir vóru Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin við teirra ungdómsfelagsskapum. Tað, sum mong spyrja er, um hetta sum hendi á vaglinum er eitt tíðartekin ella bert ein púra tilvildarlig hending.

Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava á ávísum økjum rættiliga lík sjónarmið og flokkarnir hava áður samstarva sera væl í samgongu. Men við nýggju leiðslu Tjóðveldisflokksins gjørdist Javnaðarflokkurin í stóran mun partur av fíggindamyndum Tjóðveldisflokksins. Álopini hava ikki skortað og mangan hava javnaðarfólk verið bilsin av orðavalinum hjá nøkrum av tí nýggja ættarliðinum í Tjóðveldisflokkinum. Hetta kann hava sínar orsøkir, og eitt nú hava samband við hetta, at nýggja leiðslan í Tjóðveldisflokkinum valdi at samstarva til høgru heldur enn til vinstru. Tað man geva mongum tjóðveldismann ringan ráka.

Men so kemur fundurin á Vaglinum tann 1. februar. Hann kann vera íkomin av berari tilvild. Tær skilagóðu leiðslurnar í báðum flokkum hava heilt einfalt sæð, at nú má talast at. Tey kynisku halda kanska , at fundurin bert skal tulkast sum eitt varskóð frá Tjóðveldisflokkinum til Fólkaflokkin, ið av fullum huga gongur inn fyri krígnum – ella við øðrum orðum ein partur av tí áhaldandi nervakrígnum millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Men fundurin kann eisini vera eitt tekin um, at broytingar eru á veg í føroyskum politikki. Tá ein kann samstarva um ein friðarfund, so kann ein eisini samstarva um onnur viðurskifti og mál. Er tað við at tiðna millum Javðarflokkin og Tjóðveldisflokkin, kann tað fáa víttrøkkandi politiskar fylgjur, og kundi tað verið áhugavert at sæð, hvønn veg eitt slíkt toybil bar. Er talan hinvegin bert um tilvild, so kunnu vit bara staðfesta, at tað var ein heppin avgerð at halda fundin, ein avgerð, ið tænir báðum flokkum til stóra æru.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Friðargonga á Vaglinum

**Gerhard Lognberg**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Fyrst av øllum vil eg siga, at einki kann vera betur enn at tosa um frið. So hendan friðargonga kundi bara verða uppfatað sum positiv.

Í fjølmiðlunum hevur verið lýst, at henda friðargongan var fingin í lag av Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum.

Nú er tað so, at eg sjálvur eri valdur til tingmann fyri Javnaðarflokkin, men má siga, at eg hoyrdi um friðargonguna í fjølmiðlunum, (men tað er kanska í lagi).

Eg sat við borðið og át nátturða, tá ið eg hoyrdi útvarpið, og hetta brotið kom frá einum av røðarunum í nevndu friðargongu: »Ísrael skal gevast at verja stolið land, men heldur verða vinur við tey muslimsku londini«.

Eg má siga sum ein javnaðarmaður segði í einum øðrum føri, og er tað ein skilamaður, eg mundi sett í hálsin.

Eg vil spyrja: Eru hetta leivdir av kommunismuni, sum spøkja, ella hvat?

Eg vil síðan gera greitt, at eg vil ikki verða við til at banna Ísrael. Guds orð sigur, at tann, sum bannar Ísrael, verður bannaður sjálvur, og tann, sum signar Ísrael, verður signaður sjálvur (1. Mós. 12,3).

So eg taki avstand frá slíkum, og vil undir ongum umstøðum, at slíkir røðarar skulu verða talsmenn fyri meg.

# Leingi er tað, ið væl skal vera

**Heðin Mortensen**
*tingmaður*



Bjørn Patursson skrivar í bløðunum, at nú er endiliga ein tingmaður úr Sambandsflokkinum, ið vil viðgera spurningin um ta almennu jørðina, sum vit øll eiga. Men hetta er ikki fyrstu ferð, at vit í Sambandsflokkinum hava roynt at fingið eitt orðaskifti í lag um búnaðarjørðina.

Fyrispurningarnir hjá mær í tingárinum 1998 nr. 48, 49, 50 og 51 (settir fram á vári 1999) og fyrispurningur nr. 51 í tingárinum 2000 (settur fram á vári 2001) vóru allir um landbúnað. Hesir fyrispurningar kunnu lesast á heimasíðunum www.logting.fo og á www.hemorten.com.

Tað, sum eg gjørdi vart við tá var, at skipanin við landsjørð er ein avoldað skipan. Tað er ein øgiligur tørvur á jørð til trivnað og mentan. Fleiri hundrað fólk standa á bíðilista í Havnini at fáa traðir til keyps. Samstundis eru fleiri hundrað traðarmenn hjá landinum eins og teir festarar, sum ikki liva av jørðini, sum gjarna vilja keypa jørðina frá landinum fyri veruligar pengar.

Mjólkin er tann minni parturin av málinum. So skjótt vit avmarka studningin til bert at vera ein útjaðarastudning, so fara vit at síggja nøkur fá effektiv fjós, sum fyri tað mesta vera í útjaðaranum, har tey gera mestan munin fyri fólkið á staðnum.

Her í miðstaðarøkinum er ikki í sama mun brúk fyri vinnuligum landbúnaði. Vit eiga tí at umhugsa at gera, sum í 20'unum, tá Havnar kommuna keypti Flatnahaga. Kommunan eigur at keypa aðrar hagar frá landinum nærhendis býnum og stykkja teir út til traðir, grundstykki, grøn øki, golfbanar, gongugøtur, rossagøtur, neystagrundir, osfr., osfr. Sjálvandi skal bóndin fáa eitt veruligt endurgjald fyri at missa garðin, men tað ber ikki til at fara og selja bøndunum jørð nærhendis Havnini.

Havnarmenn vilja hava jørð í Havn, ikki minst so jørðin á bygd kemur teimum lokalu til góðar. So ella so má meiri jørð verða til taks hjá havnarfólki nærhendis Havnini. Tað sama er galdandi fyri Klaksvík og helst eisini Skálfjørðin, trivnaður krevur trivnaðarjørð.

Her skal tó undirstrikast, at vit mugu tryggja okkum, at talan ikki verður um "spekulatión", soleiðis at fólk keypa jørð, sum verður seld víðari til onnur við stórum vinningi.

Hvat viðvíkir skuldini hjá bøndunum er bara eitt at siga. Tað er longu ein greið heimild at siga bøndum upp, ið ikki gjalda sína skuld. Tí mugu vit siga við tann, sum skyldar fleiri milliónir uppá nakkan av nøkrum fáum mjólkineytum: "Álvaratos, hetta er ikki akkurát nakað, sum tú sært út til at klára, far tí heldur og ger okkurt annað" – so stykkja vit út og selja ta jørðini fyri hægst bjóðandi og skapa størri útboð av privatari jørð.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Tóku ímóti Høgabergi í Fuglafirði



*Høgaberg sær gott út, hóast hann er bygdur seinast í sjeytiárunum. Tá ið skipið av fyrstan tíð kom til Føroya, var tað frammanfyri sína tíð.*
*Mynd: Torleif Johannesen*

**Tá ið Gullfinnur, fyrrverandi Silja, kom til Føroya úr Noregi fyrst í áttatiárunum, var skipið frammanfyri sína tíð**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*

Fuglafjørður: Leygardagin kl. 11 legði nótaskipið, Høgaberg, til bryggju í Fuglafirði.

Skipið, sum felagið, EM-Shipping eigur, kemur í flotan fyri Jón Sigurðsson, sum fer úr flotanum. Høgaberg er fyrrverandi Gullfinnur, sum vestmenningar áttu. Hann er keyptur úr Noregi, haðani hann eisini varð keyptur av fyrstan tíð. Norska felagið hevur nú yvirtikið Jón Sigurðsson, samstundis sum felagið hevur selt EM-Shipping Høgaberg. Nakrar krónur eru sjálvsagt eisini ímillum, tí Høgaberg er eitt nógv størri og betri skip enn Jón Sigurðsson.

## Móttøka

Tá ið Høgaberg kom á Fuglafjørð, var móttøka á bryggjuni. Væl av fólki var samankomið. Hornorkestrið spældi og bygdarráðsformaðurin, Sigurd Simonsen og reiðarin, Anfinn Olsen, søgdu nøkur orð.

Reiðarin beyð fólkinum, sum vóru komin at heilsa skipi, manning og eigarum, umborð eftir, at sjálv móttøkan var av.

Klokkan 15.30 seinnapartin leygardagin fór Høgaberg ein stimitúr saman við innbodnum, og klokkan 18 var døgurði á Muntra.

Bæði umborð og við døgurðan á Muntra vórðu røður hildnar og heilsanir bornar fram. Reiðaríið fekk eisini blómur handaðar.

Íslendski samstarvsparturin í keypinum av Høgabergi er Samherji. Reiðari verður Anfinn Olsen; hann var eisini reiðari á Jón Sigurðssyni.

Manningin, sum var við Jón, fer umborð á Høgaberg. Øll manningin er føroysk, og skiparin verður hin sami, nevniliga fuglfirðingurin, Jógvan Hentze, sum býr í Gøtu. Áðrenn hann fór umborð á Jón Sigurðsson, var hann stýrimaðurin og avloysari sum skipari við nótabátinum, Tróndi í Gøtu.

## Nógv størri

Tá ið Gullfinnur varð keyptur úr Noregi til Føroya fyrst í áttatiárunum, kallaðist hann Silja. Skipið var frammanfyri sína tíð á tann hátt, at tað hevði stóra frystiorku og kundi framleiða mjøl. Skipið var eini 10 ár í føroyska fiskiskipaflotanum.

Nú fyrrverandi Silja á øðrum sinni varð keyptur úr Noregi, kallaðist skipið, Store Knud.

Høgaberg lastar góð 2.000 tons, meðan Jón Sigurðsson lastaði minni enn 1000 tons, og maskinorkan er út við tvær ferðir so stór.

Jón Sigurðsson var ov lítil og hevði ov lítla maskinorku, tá ið teir trolaðu eftir svartkjafti. Tí kom heldur ikki nógv burtur úr á hesi veiði.

Bæði høvuðsmotorur, ljósmotorar, spøl, pumpur og kraftblokkur eru skift á Høgabergi miðskeiðis í nítiárunum, umframt ein partur av apeteringini.

Skrokkurin á skipinum sær gott út, og eigararnir halda seg hava gjørt eina góða íløgu.

## Navnið

Navnið, Høgaberg, er staðarnavn norðanfyri Góðadal, norðanvert Fuglafjørð.

Skipið er bygt seinast í sjeytiárunum.

Høgaberg hevur onga verksmiðju longur, men tangar, sum onnur nótaskip, ið veiða til ídnað. Skipið fer at fiska sild, makrel, lodnu og svartkjaft.



*Væl av fólki tók ímóti Høgaberg, tá ið skipið legði til bryggju í Fuglafirði leygardagin klokkan 11.*
*Mynd: Torleif Johannesen*



*Høgaberg fer at fiska sild, makrel, lodnu og svartkjaft.*
*Mynd: Torleif Johannesen*